# Eg kann gera mun



*Sjónleikarin Bárður Persson metir, at hann veruliga kann gera mun, um MBM letur hann læra føroyingar at pakka mjólkapakkar saman. Hetta kann minka munandi um ruskmongdina hjá føroyingum, sigur Bárður, nú vit hava sett hann í bláa stólin*

## Bárður Persson, sjónleikari, 37 ár

*Lýs teg sjálvan við trimum orðum:*
Neurotiskur, positivur og forvitin

*Hvat orð ella hvønn setning nýtir tú oftast?*
"Altso, tað sum eg meini er..." man vera tað, sum eg sigi mest, tað eisini eitt sindur neurotiskt.

*Hvørjum hyggur tú at hjá hinum kyninum?*
Eg havi eina fasinatión av ovara partinum av bringuni hjá kvinnum, og haldi øsbeinið vera eitt lekkurt punkt. Men annars eri eg, sum mannfólk flest og hyggi, at øllum hinum, sum mannfólk hyggja at.

*Hvat er tað fyrsta, sum tú gert um morgunin?*
Eg geri morgunfimleik. Eg eri júst byrjaður og taki tíggju minuttir, har eg geri fimleik, hetta er besti mátin at byrja ein dag uppá, og eg eri longu ordiliga ambitiøsur hesum viðvíkjandi.

*Hvat stressar teg?*
Óloystar uppgávur toli eg ikki. Eg haldi, at eg havi eitt sindur tendens til Asperger. Eg toli ikki, at man ikki veit hvar man hevur eitt projekt, eg vil helst hava allar staklutirnar upp á pláss beinanvegin.

*Hvat gleðir teg?*
Eg havi ikki góðar svøvngávur, tí gleðist eg, tá eg fái ein ordiliga góðan svøvn, tá føli eg, at eg kann alt.

*Nær feldi tú seinast eitt tár?*
Eg eri nokkso kensluborin, tá eg síggi filmar, sum hava happy ending og sovorðið. Seinast eg ordiliga græt, var, tá eg sá Angelas Aske í Sjónvarpinum, tá græt eg virkuliga.

*Hvat var seinasta ynski, sum tú fekst uppfylt?*
Tað var akkurát í áðni, tá eg fekk kaffi frá Alv, sum gera tað besta kaffi í býnum. Eg fekk tað eitt sindur sterkari enn vanligt, og so var tað heilt perfekt.

*Hvar arbeiðir tú?*
Seinastu tíðina havi eg fyri tað mesta arbeitt á Tjóðpallinum, men eg fáist eisini við ymiskt skriviarbeiði heima. Men nógv av mínum arbeiði fyrigongur í høvdinum, so hvar eg arbeiði kemur an uppá, hvar kroppurin er. Í løtuni er kroppurin í einum bussi úti í Havnardali, har hann venur ein einmansleik, ið hann fer at framføra í hesum bussinum í næstum.

*Hví valdi tú arbeiðið sum sjónleikari?*
Tað kemst nokk fyrst og fremst av, at eg altíð havi verið fasineraður av menniskjum, sum liva eitt sindur við síðuna av, sovorðnum skeivum eksistensum. Og ta sum hendir millum menniskju uppá gott og ringt. Eg vildi sleppa at fortelja søgur um tey, sum ikki líkjast hinum.

*Hvat lag er heimsins besta?*
Tað lagið, sum hevur gjørt mest við meg, er Nothing Compares To You hjá Sinnead O'Connor

*Hvat er besta uppfinningin og hví?*
Súkklan er besta uppfinningin. Tí hugsað, um øll súkklaðu, hvussu nógv minni dálking var, hvussu henda motiónin hevði gjørt, at nógv færri fólk endaðu á sjúkrahúsinum, og hugsa um alt plássið, ið var í býnum, tá parkeringsplássini ikki vóru neyðug. Súkklan er næstan bara góð.

*Hvat hevur tú í lummunum beint nú?*
Ein tendrara, ein kamb og eitt visa kort, hetta havi eg í tilsamans í sjey lummum. So man kann siga, at eg havi eitt lágt lummaprosent í dag

*Hvat er títt besta heimaráð?*
Mátin eg pakki mjólkapakkar saman uppá, er mítt besta heimaráð. Teir gerast ikki hægri enn 1½ sentimetur. Á hendan hátt beri eg fimm ruskposar út í staðin fyri sjey um vikuna, hetta sparir teir á Sandvíkarhjalla fyri nógv. Um MBM vil vita uppskriftina, so eru tey vælkomin at ringja, so kann eg læra tey, hvussu man ger. Eg haldi at hetta er eitt øki, har eg virkuliga kann gera mun.

*Hvar er keðiligast í Føroyum og hví?*
Nólsoy er ein bygd, sum eg uppá ongan máta haldi vera keðiliga, so tað keðiligasta staðið, má vera tað mótsatta staðið av Nólsoy.

*Hvussu ofta speglar tú tær?*
Eg spegli mær faktisk hvørja ferð eg komi framvið einum spegli, so hvussu ofta eg spegli mær kemur an uppá, hvar eg eri. Fólk hava ein tendens til hanga spegl allastaðni, og eg má líka hyggja, hvussu eg síggi út beint tá.

*Hvussu ofta ert tú hjá frisør?*
Eg fari til frisør sirka annan til triðja hvønn mánað

*Hvar ert tú um 10 ár?*
Tá havi eg verið burtur í nøkur ár, og eri komin heim aftur, og so eri eg vónandi ordiliga komin í gongd, við tað, sum eg kanska brenni allarmest fyri: at skriva.

*Hvør er tín stuttligasta uppliving á palli*
Tann stuttligasti sjónleikurin, sum eg havi verið við í, er Søgur úr Krabburð, og stuttligast var at spæla í Skúgvi, fólk vóru so glað og við uppá tað, tey eru ikki so von við, at nakað kemur handan vegin.